## 200 ár síðani bumbing av Keypmannahavn



Nógv verður gjørt burturúr, at tað í ár er 200 ár liðin, síðani Keypmannahavn varð bumbaður. Tað er felagið History Tours, sum skipar fyri hópin av tiltøkum í hesum sambandi. Frá 1. til 4. sepember vera seks gongutúrar ígjøgnum býnin, har bumbingin er tema. Bumbingin hevur ovurhondsstórar fylgjur. Frá at hava verið eitt regionalt stórveldi varð Danmark bumbað aftur til at gerast eitt fátækt smáríki.

## Rani Nolsøe á Skarv

Leygarkvøldið fara Rani Nolsøe og Páll Sólstein at undirhalda á Skarv. Herfyri spældu hesir báðir til eitt sera væleydnað tiltak í heimbýnum Klaksvík. Leygarkvøldið syngja og spæla teir tónleik eftir Frændir, Straight Ahead, Elton John, Billy Joel, John Lennon, Queen og Kris Kristofferson. Rani syngur og spælir gittar og Páll á keyboard. Føroyska róðrarstevnan í Sydhavnini endar somuleiðisá Skarv við máltíð og undirhaldi áðrenn almenni dansurin byrjar.

# Samgongan ósamd um semju

**Ikki allir samgongulimir ætla at akta floksformenninar, sum hava avtalað at bíða við einum valdømi til eftir valið**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyrst boðaðu floksformenninir í samgonguni frá, at teir hava avtalað at bíða við uppskotinum um eitt valdømi. Síðani boðaði Edmund Joensen, løgtingsformaður og samgongulimur frá, at hann kortini ætlar sær at koyra uppskotið ígjøgnum. Og nú siga aðrir limir í samgonguni, at teir heldur ikki ætla at akta formenn sínar. Í Sambandsflokkinum ger Jóhan Dahl, tingmaður úr Suðuroy, púra greitt, at hann fer at atkvøða fyri uppskotinum um eitt valdømi, sum tað fyriliggur nú, tí hann sær onki endamál við at drála. Eisini Poul Mikkelsen úr Fólkaflokkinum ætlar sær avgjørt at atkvøða fyri uppskotinum, koyrir Edmund Joensen tað ígjøgnum.

### Øll góvu seg

Í gjár, hósdagin, ljóðaði annars, at samgonguflokkarnir og formenn teirra vóru komnir til ein semju, sum millum annað hevði við sær, at málið um eitt valdømi verður útsett til eftir løgtingsvalið. Eftir fundin segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at samgongan var býtt í tveir bólkar, og tá hvørki løgtingsformaðurin ella neisíðan vildu slakað, varð neyðugt at finna eina semju, sum partarnir kundu liva við. Tí innibar semjan eisini, at Suðurstreymoyar valdømi til komandi løgtingsval fær ein umdømisvaldan tingmann afturat.

### Onki broytt

Men Edmund Joensen, sum eigur uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi, segði við Útvarpið, at einki er broytt fyri hansara viðkomandi, og at Løgtingið ikki er bundið av nakrari avtalu í samgonguni.

- Tað er upp til Løgtingið at gera av, hvat skal henda við hesum uppskotinum, og nær møguligar broytingar skulu koma í gildi, og tað er ikki bundið av nakrari sum helstavtaluviðsamgonguna. Tað er lagt fram, so Tingið frítt kann taka støðu til sína egnu skipan, sigur Edmund Joensen.



*Bæði Jóhan Dahl og Poul Mikkelsen fara at atkvøða fyri uppskotinum um eitt valdømi, sum Edmund Joensen ætlar at koyra ígjøgnum*

# Kennir onki til nakra semju

**- Eg kenni onki til nakra semju á kreppufundinum í samgonguni um ætlanina at gera Føroyar til eitt valdømi, sigur Johan Dahl, sum er næstformaður í Sambandsflokkinum**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er ongin orsøk til at drála við ætlanini at gera Føroyar til eitt valdømi, sigur samgongutingmaðurin, Johan Dahl, hann ætlar sær at atkvøða fyri uppskotinum frá Edmundi Joensen sum tað fyriliggur, tí hann kennir ikki nakra semju í samgonguni*

- Eg kenni ikki til nakra semju í samgonguni um ætlanina hjá Edmundi Joensen at gera Føroyar til eitt valdømi.

Johan Dahl tvíheldur um, at spurningurin um at gera Føroyar til eitt valdømi hevur ongantíð verið eitt samgongumál og tað verður aldrin eitt samgongumál.

- Ongin samangonga hevði nakrantíð blivið samd um hetta mál og tí er tað eisini rætt at tað er løgtingsformaðurin, sum vegna allar flokkar á tingið leggur málið fram, hann umboðar alt tingið og ikki bert samgonguna.

- Sostatt fer hvør tinglimur framvegis at atkvøða eftir egnari sannføring.

Johan Dahl sigur, at hann kennir onki til nakra semju, sum tað varð fráboðað at floksformenninir í samgonguflokkunum skuldi havt gjørt á kreppufundinum í samgonguni í gjár.

- Tann semja, sum Sambandsflokkurin gjørdi innanhýsis í gjár, er, at uppskotið hjá Edmund Joensen verður viðgjørt í Løgtinginum, sum vanligt.

- Aðrar semjur kenni eg ikki til og eg vænti ikki at formaður okkara fer at avtala annað enn tað sum tingmanningin avtalaði við hann ígjár, leggur Johan Dahl afturat.

Men Johan Dahl staðfestir eisini, at tað tykist sum um at løgmaður, og partvís eisini formaður Fólkafloksins, Jørgen Niclasen, hava hug at venda málinum á høvdið og at leggja nakað annað í tað sokallaðu semjuna enn tað, sum í veruleikanum liggur í henni.

### Johan fylgir Edmundi

Eftir samgongufundin í gjár, kunngjørdu Løgmaður og Jørgen Niclasen, at semja var um, at Føroyar skulu ikki verða eitt valdømi á hesum løgtingsvalinum, men at Suðurstreymoy skuldi fáa ein tinglim afturat.

Men tað sær út til, at Løgmaður og fólkafloksmaðurin hava selt skinnið, áðrenn teir høvdu fingið lívið av bjørnini.

Tí Johan Dahl ger púra greitt, at hann ætlar at atkvøða fyri uppskotinum hjá Edmundi Joensen, akkurát, sum tað fyriliggur.

Men hann staðfestir eisini, at nú svarar hann bara fyri seg sjálvan og ikki fyri flokkin.

- Eg dugi ikki at síggja nakað sum helst endamál í at útseta ætlanina at gera Føroyar til eitt valdømi, sigur Johan Dahl.

- Tað er ikki til nakað sum helst gagn at drála við ætlanini, tí hugsa vit bæði um ætlanini at styrkja kommunubygnaðin, um at fáa abyrgdarbýtið millum land og kommunur greiðari og hugsa vit um ætlanina at fáa eina kommunala útjavningarskipan, hevur tað týdning at málið um at gera Føroyar til eitt valdømi, verður avgreitt beinanvegin.

- So koma hesi viðurskifti eisini upp á pláss tí tað er umráðandi fyri økini, sigur Johan Dahl.